

SKEMMAN SØKIR

# HANDILSLÆRLING

Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar góðar fyrimunir.

**Vit bjóða:**
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum av-bjóðingum bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
- Løn sambært avtalu.

**Vit vænta at tú ert:**
Sámstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi, arbeiðssom/- samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 16 fólk. Eisini eru deildir í hesum londum: Íslandi, Kanada, Letlandi, Litava, Estlandi, Rumenia og Bulgaria. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári.

Síðan Skemman byrjaði fyri 22 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 1000 arbeiðspláss tilsamans, á øllum deildunum í teimum 8 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark. Gjøgnum samstarvið við Jysk, fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jútlandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanliga handilsútbúgving. Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

Hevur hetta tín áhuga, send so eina skrivliga umsókn til:

Skemman
Staravegur 7
Postboks 3278
110 Tórshavn
ella á teldupost: skemman@skemman.fo

Handilslærlingurin byrjar 15. sept 2008 ella skjótast gjørligt

# LAGURFÓLK

Vit søkja eftir einum starvsfólki at arbeiða á lagrinum.

**Tú** skalt vera ágrýtin og hugagóð/ur og hava góð samstarvsevni, bæði viðv. kundum og arbeiðsfeløgum.

Best er um tú hevur **royndir** innan lagurarbeiði men hetta er tó eingin treyt.

**Lønin** eftir avtalu.

Í Skemmuni kunna vit bjóða tær eitt gott, trygt starv, við góðum arbeiðsfeløgum.

Ljóðar hetta áhugavert, so er at senda eina umsókn sum skjótast, og viðhefta avrit av møguligum prógvum og viðmælum.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Umsóknarfreist:** 01.10.2008.
Talan er um fast starv, fulla tíð, dagarbeiði.

**Meira fæst at vita** um starvið og læruplássið við at ringja tel 315588 og spyrja eftir Dan Hansen, dh@skemman.fo

SKEMMAN
BAÐIRÚMIÐ • KAMARIÐ • HEIMIÐ

VIKUBLAÐIÐ